Kyndil-Neistin 14-28 (5-11)

Sorl í lokauppgerðini

Kvinnuliðið hjá Neistanum lat ongan iva vera um, hvør eigur besta liðið í høvuðsstaðnum, tá tær sunnudagin góvu Kyndli ein rættiligan bank

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Eftir kvinnudystin sunnudagin ímillum Kyndil og Neistan, er einki at ivast í, hvat felag hevur sterkasta kvinnuliðið í høvuðsstaðnum. Tølini lúgva sjáldan, og tað at Neistin megnaði at skjóta tvífalt so nógv mál sum Kyndil, boðar eisini frá einum risastórum styrkismuni.

Ikki minst er tað ein stórur styrkur hjá Neistanum, at Gunnleyg Berg nú aftur er at síggja á liðnum

Mynd: Álvur Haraldsen

Eitt lítlan vørr

Fyrstu løtuna av dystinum var tó ikki nógv, sum bendi á, at munurin skuldi gerast somikið stórur ímillum liðini bæði.

Neistin var helst tað liðið, sum byrjaði betri, men eftir eina sera nølandi byrjan, kom Kyndil tó meira við í spælið, og tær vunnu seg eisini heilt nær Neistanum, men tá Neistin fram móti endanum av hálvleikinum vann sær góðan fyrimun í tveimum yvirtalsstøðum, skrædnaði millum liðini bæði.

Í seinna hálvleiki syrgdu tær bláu alt fyri eitt fyri, at sjógvur varð lagdur ímillum liðini, og so var liðugt hjá Kyndli. Stríðsviljin, sum annars hevði verið sjónligur stóran part av dystinum, var nú fullkomuliga horvin, og hóast trygga leiðslan gjørdi, at nærlagnið á Neista-liðnum hvarv til tíðir, so nart hetta ongan tíð við tann veruleika, at talan fór at gerast um ein sigur av teimum heilt tryggu.

Mugu stríðast

Hóast Kyndil neyvan fær nýtt úrslitið í dystinum til nakað sum helst, so staðfesti dysturin um ikki annað, at tað er neyðugt hjá liðnum at stríðast sum ein heild, um úrslitini skulu batna.

Eftir at liðið í fjør misti somikið nógv av fólki, at allar vónir um eina heiðurliga endastøðu mundu hvørva, sær munandi betri út í so máta hetta kappingarárið. Nakað av frágongd hevur tó verið aftur hetta árið, men hinvegin skuldi tilgongdin av leikarum verið somikið stór, at tað skuldi vigað upp ímóti.

Tað er tó ikki nóg mikið, bert at hava góðar leikarar, um úrslit skulu røkkast. Stríðsviljin eigur eisini at vera til staðar, og hesin manglaði í ólukkumát sunnudagin. Fyri viku síðani sýndu tær í dystinum móti Stjørnuni, at liðið kann spæla upp ímóti teimum stóru, men hesaferð fingu tær so eisini prógv fyri, at hetta ikki gerst uttan ein stóran innsats frá hvørjum einstaknum leikara.

Bílig bakgrund

Nú tveir dystir eru farnir av kappingini, er Neistin á odda í kvinnudeildini. Kanska hevur bakgrundin verið heldur bílig, men liðið hevur tó í løtum sýnt, at tær væl eru førar fyri at spæla heilt góðan hondbólt, og aloftast er liðandin eisini í topp, so tað kann væl verða, at liðið aftur í ár fer at gera seg galdandi í heiðursmerkjarøðin.

Ikki minst er tað ein sera stórur styrkur, at liðið nú aftur hevur Gunnleyg Berg at dúva upp á í strikuspælinum. Eftir eitt ár í Íslandi er sjónligt, at hon hevur tikið seg sera nógv fram – bæði tekniskt og taktiskt – og ikki minst koma evni hennara til sín rætt í verjuspælinum.

Har umframt tykist liðið eisini at vera væl mannað á bakplassunum, tó at tað kanska er í væntandi breiddini á hesum, at størsti veikleikin á liðnum skal finnast. Enn hevur hetta tó ikki kostað nakað, men spurningurin er so, um liðið sleppur eins óskalað ígjøgnum dystirnar, tá mótstøðan verður størri. Fyrsta ábendingin um hetta fæst helst longu hósdagin, tá Stjørnan kemur á vitjan.

Dysturin í tølum:
Kyndil-Neistin 14-28 (5-11)
Málskjúttar:
Kyndil: Annika Ljósstein 6(2), Ann Hansen 3(1), Lotte Sørensen 3(1), Marjun Tróndarson 1, Maina Rubeksen 1
Neistin: Gunnleyg Berg 7, Katrin á Neystabø 6(1), Birita Wardum 5, Kára á Dunga 4, Rakul Augustinussen 3(1), Mildrid Jacobsen 2, Susan Brockie 1
Brotskøst: Kyndil 7, Neistin 2
Útvísingar: Kyndil 5, Neistin 5
Dómarar úr StÍF: Pole Hansen og Jústines Justinussen. Tóktust hava tamarhald á dystinum, men við hvørt kundi ein ynskt sær størri konsekvens í dømingini.

Mjølnir-TB 0-3 (17-25, 13-25, 15-25):

TB vann fyri fyrstu ferð í Klaksvík

Flogbóltur, kvinnur: Uttan nakað serligt hóvastak vann TB 3-0 móti Mjølni í Klaksvík. Samstundis sum hetta var fyrstu ferð nakrantíð, at TB vann á Mjølni í Klaksvík, er tað eisini fyrstu ferð í mong Harrans ár, at Mjølnir-kvinnurnar hava tapt so dyggiliga á heimavølli

FLOGBÓLTUR
Emil Lisberg Jacobsen

Fyri fyrstu ferð nakrantíð vunnu flogbóltskvinnurnar hjá TB landskappingardyst í Klaksvík móti Mjølni. Og tá tað so endiliga eydnaðist, var tað sera sannførandi.

Hóast tað enn er stutt frálíðið í kappingarárinum, so mugu tvørákvinnurnar longu finna seg í verða róptar fyri fremsti FM-kandidaturin

Mynd: Alexandar Djorovic

Tað er sera sjáldan, at Mjølnir tapir á heimavølli, men leygardagin kundu tær einki gera móti einum sera vælleikandi TB-liði, sum uttan iva verður sera tungt hjá hinum at syfta í ár. Serliga teir báðir nýggju útlendsku leikararnir Lili Popescu úr Rumenia og Maja Popovich úr Bosnia-Hersegovina skaraðu framúr, og í teimum báðum hevur TB veruliga fingið tveir kantspælarar á sera høgum støði. Tí er einki at siga til, at vónirnar á Tvøroyri eru stórar. Og tað hoyrir eisini við til søguna, at hini bæði sterku liðini í meistaradeildini, Dráttur og Mjølnir, eru viknað í mun til seinasta kappingarár.

Hjá Mjølni eru Tina Jacobsen og Margit Poulsen ikki við í ár. Tær báðar gjørdust ávikavist Ársins blokaduleikari og Ársins móttøkuleikari í fjør, so tað sigur seg sjálvt, at hetta er sera svárur missur hjá Mjølni.

Men spurningurin er, um tær høvdu gjørt so stóran mun móti TB, sum stýrdi dystinum frá byrjan til enda og vann sera trygt. TB var betri á øllum økjum. Móttøkurnar, servurnar og hevingarnar – alt riggaði betur hjá suðuroyarliðnum enn hjá Mjølni, ið hevur fingið fleiri ungar leikarar inn á liðið og sum týðiliga ikki hevur somu styrki sum seinastu árini. Bara tað at tapa 3-0 á heimavølli er so óvanligur kostur hjá Mjølni, at tað sæst, at okkurt stórt er á veg á Tvøroyri.

Ov tíðliga?

Tað er sjálvandi alt, alt ov tíðliga at útrópa TB sum føroyameistara, men inntil víðari mugu tær bara finna seg í at vera FM-favorittar. Komandi leygardag spæla tær á útivølli móti føroyameistarunum Drátti, sum vunnu sín fyrsta dyst í kappingini móti ÍF. Vinnur TB eisini á Giljanesi, eru báðir teir – á pappírinum – truplastu dystirnir í kappingini vunnir, og so hótta tær við at taka allan spenningin úr kappingini, tí um hvørki Mjølnir ella Dráttur fær gjørt nakað við TB, er ringt at fáa eyga á nakran annan sum kann. Men enn eru nógvir dystir eftir, og sjálvt flogbóltsleikarar mugu duga at hava bæði beinini á jørðini.

Mjølnir-Fram 2-3 (28-26, 31-29, 17-25, 13-25, 5-15):

Mjølnir loypti hvøkk á Fram

Flogbóltur, menn: Mjølnir vann tvey maratonsett móti Fram leygardagin, men í síðsta enda vóru tað teir úr Havn, sum fóru við sigrinum

FLOGBÓLTUR
Emil Lisberg Jacobsen

Sum tey flestu høvdu roknað við, eydnaðist tað hjá Fram at vinna á Mjølni, men havnarliðið mátti veruliga kempa fyri sakini, og í royndi og veru lá Mjølnir eitt skifti í triðja setti til at vinna dystin 3-0.

Dystargongdin var í stuttum tann, at Mjølnir vann tvey tey fyrstu settini, sum bæði vóru sera drúgv. Fyrsta settið vunnu klaksvíkingar 28-26, og í øðrum setti bleiv tað heili 31-29! Í triðja settinum førdi heimaliðið eitt skifti 10-5, men so vendi gongdin, og Fram vann at enda hetta settið 25-17. Fjórða sett endaði 25-13 til Fram, sum eisini vann tað avgerandi fimta settið 15-5. Altso ein 3-2 sigur til Fram, men Mjølnir beit væl frá sær og hótti eisini við at vinna dystin.



Fram hevði trupulleikar, men at enda drógu teir longra stráið í einum spennandi dysti í Klaksvík

Mynd: Alexandar Djorovic

Tað var fyrst og fremst stríðsandin, sum lyfti Mjølnir upp í byrjanini av dystunum. Allir kempaðu væl, og tað lá væl fyri hjá Rúna Elttør, sum er sterkasta álopsvápnið hjá Mjølni, at sláa bóltarnar niður í gólvið hjá Fram. Hjá Fram vóru tað fyrst og fremst Rúni Weihe og leikandi venjarin Romica Pascu, sum syrgdu fyri at geva Mjølni skarpam gang hesi bæði fyrstu settini.

Og tað vóru eisini servurnar hjá Rúna Weihe, sum kanska var høvuðsorsøkin til, at Mjølnir fánaði so líðandi. Við støðuni 10-5 til Mjølnir í triðja setti fekk hann við nøkrum góðum jump-servum javnað støðuna til 10-10, og hetta var tað, sum meir enn nakað annað vendi dystinum í Klaksvík leygardagin.

Eftir at Fram hevði fingið tamarhald á í triðja setti, fór orkan so smátt at ganga undan hjá Mjølni, og Fram fekk ta sálarligu yvirvágina, sum er so sera týðningarmikil í flogbólti. Villurnar, sum teir høvdu gjørt tvey tey fyrstu settini, vórðu lúkaðar burtur, og at enda hevði Fram ólíka lættari við at vinna síni trý sett, enn Mjølnir hevði havt við at vinna síni tvey. Samanumtikið ein væl uppiborin sigur til Fram, men teir máttu stríðast fyri tí.

Vit fara eftir øllum

Orðini omanfyri eigur Jákup á Stongum úr SÍ, sum hevur fingið eina flúgvandi byrjan uppá flogbóltsárið. Hann heldur, at SÍ við núverandi liðnum kann vinna bæði steypafinaluna og meistaradeildina

FLOGBÓLTUR
Emil Lisberg Jacobsen

Í fjør gjørdi SÍ sera lítið um seg í meistaradeildini hjá monnum, har teir endaðu aftast, men sluppu undan niðurflytingini, tí einki av ovastu liðunum í næstbestu deildini kundi flyta upp.

Eitt sigandi dømi um skilið var í Havn, tá SÍ spældi móti Fleyr. Dysturin var nóg illa byrjaður, tá ein av SÍ-leikarunum meiddi sær fótin og ikki fekk spælt víðari. Teir høvdu ongan eykamann, og tí vann Fleyr dystin 3-0 eftir at hava spælt í ein minutt. Støðan var tá 1-0 til Fleyr...

Jákup á Stongum úr SÍ sigur, at tað stóð illa til í fjør og eisini hevur gjørt tað í fleiri ár. Hann heldur at vána árið í fjør eisini fekk fólk í felagnum at siga, at antin mátti okkurt álvarsligt gerast, ella fór alt fyri bakka.

Millum favorittarnar

Sørvingar valdu at bretta upp um ermar í staðin fyri bara at lata standa til, og í ár hava teir eitt lið, sum sambært teimum flestu hevur góðar møguleikar fyri at strúka heilt upp á toppin. Teir hava sett Borko Ilic sum leikandi venjara, og teir hava eisini fingið ein jugosláviskan leikara, sum eitur Rajko Petrovic. Harumframt eru leikarar so sum Jón Nielsen, Jón Falkvard og veteranurin Suni Hansen við á liðnum. Næstsíðsta vikuskifti skipaði Fleyr fyri síni árligu kapping upp undir landskappingarbyrjanina, og SÍ gjørdi ikki mætari enn at vinna hesa kappingina. Og leygardagin fylgdu teir upp við at vinna 3-0 móti ÍF í fyrsta landskappingardystinum.

Men hvat ætlar SÍ sær so í ár?

– Tað er jú altíð vandamikið at byrja so væl, sum vit hava gjørt, men heilt erligt, so fara vit eftir at vinna alt tað vit kunnu vinna, sigur Jákup á Stongum.

Men hann leggur afturat, at tað sjálvandi veldst um so nógv. Tað kann henda nógv gjøgnum eitt langt kappingarár, men við tí liðnum, teir hava beint nú, ivast Jákup ikki í, at hesin málsetningurin er realistiskur.

– Liðið er gott. Og vit hava longu vunnið móti øllum hinum liðunum í deildini, sigur hann og sipar við hesum til Fleyrkappingina, sum SÍ jú vann. Hetta ger eisini, at teir longu hava tryggjað sær pláss í steypafinaluni, sum verður spæld seinni í kappingarárinum.

Gevast ov tíðliga

– Trupulleikin hjá okkum hevur so at siga altíð verið, at vit missa leikarar. Eg veit ikki hví, men tá leikarar koma í ein ávísan aldur, fella teir frá, sigur Jákup á Stongum.

Hann vísir á, at liðið sum er nú, er rættiliga ungt burtursæð frá Suna Hansen og so teimum báðum útlendingunum, sum eru 28 og 27 ára gamlir.

– Eg veit ikki hvar teir fara, men teir spæla ikki flogbólt.

Ætlanin er, at teir báðir útlendsku leikararnir hjá SÍ eisini skulu taka sær av nøkrum av teimum yngru liðunum, og Rajko Petrovic skal eisini venja kvinnurnar hjá SÍ.

Jákup á Stongum sigur, at felagið við hesum roynir at geva teimum ungu góða venjing – nakað sum vónandi fer at vaksa um áhugan hjá teimum ungu at spæla – og at halda fram við at spæla, tá tey gerast eldri.

StÍF-Sóljan 17-25 (7-11):

StÍF bumbað niður

Sóljan vann sær fyrstu stigini í ár, tá uppflytararnir tey bæði seinnu árini hittust á Strondum, og størsta orsøkin til sigurin var uttan iva nýggi stórskjúttin hjá liðnum

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Undan kappingini í ár mundu tey flestu rokna við, at uppflytararnir úr aðru deild, StÍF, neyvan fóru niður við brestin, og í øllum varð roknað við, at tær vóru betri fyri, enn Sóljan var, tá tær fyri einum ári síðani høvdu leiklutin sum uppflytarar.

Tamarhald á

Um so er, skal ikki vera sagt her, men tað tykist í øllum førum soleiðis, at Sóljan í dag er munandi betri fyri, enn tær vóru fyri einum ári síðani.

Fyrsta dystin taptu tær tepurt fyri VB, sum verður roknað millum sterkastu liðini, og sunnudagin eydnaðist tað so vágagentunum at ogna sær øll stigini inni á Skála.

Ikki óvæntað, so var tað fyrst og fremst skotstyrkin hjá Asta Petrouskiene, sum gjørdi av við uppflytararnar, men hóast týdningurin av hesum sjálvsagt er ovurstórur, so tykist restin av liðnum nú eisini at fylgja betri við, enn tær gjørdu fyri einum ári síðani, tá Simona Dziugyte var stórskjúttin á liðnum.

Liðið er sum so eisini rættiliga ungt, og tí var helst eisini væntandi, at menningin á liðnum fór at verða sjónlig, men hinvegin hevði neyvan nakar roknað við, at byrjanin hjá liðnum fór at verða somikið góð, sum hon í veruleikanum hevur verið.

Hesa ferð hevði Sóljan fult tamarhald á dystinum frá fyrsta bríksli. Tær vunnu sær beinan vegin ein hampuliga stóran fyrimun, og eftir hetta vendist ikki hjá heimaliðnum.

Munurin vaks stútt og støðugt alla tíðina, og tá heimaliðið fram móti dystarenda minkaði nøkur fá mál um munin, var alt langt síðani avgjørt.

Dysturin í tølum:
StÍF-Sóljan 17-25 (7-11)
Málskjúttar:
StÍF: Sunfríð B. Jacobsen 5(2), Anna Maria Berthelsen 5, Ileana Manulescu 4, Poula Olsen 1, Anna B. Danielsen 1, Birna Mikkelsen 1
Sóljan: Asta Petrouskiene 11, Marjun Johansen 4(2), Sólja Jóanisdóttir 3, Jóhanna í Horni 3, Herthe J. Simonsen 2, Heidi S. Haraldsen 1, Heidi Maria Akselsen 1
Brotskøst: StÍF 3, Sóljan 2
Útvísingar: StÍF 1, Sóljan 1